# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# FERÐIN DREPUR OG SKAL NIÐUR

At ferðin í ferðsluni drepur veit hvørt mansbarn. Kortini eru tað fleiri okkara, sum beinleiðis vanvirða hetta faktum, og koyra við góðari samvitsku nógv skótari, enn loyvt er.

Í vikuni kunngjørdi Ferðslutrygd eina norðurlendska kanning sum vísir, at føroyingar eru norðurlendskir meistarar í at koyra ov skjótt. Heili 72 prosent koyra minst 10 km/t ov skjótt.

Síðani ta fyrstu ferðsluvanlukkuna, sum kravdi mannalív í 1928, eru út við 270 fólk deyð í ferðsluni, og nógv fleiri eru skadd og illa skadd. Tað bleiv heilt galið í sjeyti- og áttatiárunum, men her er tíbetur nógv bøtt um seinnu árini. Hetta er ikki minst tí, at bilarnir eru vorðnir so nógv tryggari, men eisini hevur verið talan um eina hugburðsbroyting, sum hevur fingið tey ringastu at uppføra seg virðiligari í ferðsluni.

0-hugsjónin, sum løgtingið eisini hevur samtykt, hevur tað vakra endamál, at eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni. Hetta er eitt ideali, sum vit øll hava skyldu at liva upp til.

Men hví koyra vit so ov skjótt, kunnu vit spyrja. Vit hava ikki long strekki at koyra í Føroyum. Tey eru fá, í koyra meira enn ein tíma úr stað í annað. Koyra vit so 80 km/t, so vita vit, at vit koma 80 km eftir einum tíma. Miðalferðin verður tó altíð lægri. Men siga vit, at miðalferðin er 60 km/t, so flyta vit okkum 60 km í ein tíma. Koyra vit 10 prosent skjótari, so koma vit altso bara seks km longru, ella seks minuttir fyrr á mál.

Hetta eru so smáir marginalar, at tað undir ongum umstøðum hevur nakran týdning, borið saman við tann vanda, vit seta okkum og onnur í við at koyra skjótari. Vísindini siga, at koyrir tú oman fyri 90 km/t heldur enn niðanfyri, so økist talið av deyðsvanlukkum við 21 prosentum. Koyrir tú 80 km/t, tá skaði hendir, so er møguleikin fyri at verða skaddur 50 prosent. Koyrir tú 100 km/t, tá skaðin hendir, so er møguleikin fyri at verða skaddur 100 prosent.



Fyri nøkurm árum síðani hevði Bill Justinussen, løgtingsmaður uppskot frammi um at hækka hámarksferðina á landsvegunum í Føroyum. Eitt slíkt uppskot er í besta lagi tápuligt. Tað kann ikki koma upp á tal at hækka hámarksferðina á okkara krókutu landavegum. Høvdu vit havt tvísporaðar motorvegir, so var tað nakað annað. Men tað hava vit ikki og tað fáa vit valla.

Tí eiga vit at hava størstu respekt fyri ferðini. Tað eigur øll ferðsluundirvísing eisini at byggja á – og fáast bilførarar ikki at skilja tað, so er undirvísingin ikki nóg dygg. Øll ferðslulóggáva eigur eisini at virða hetta. Tá ferðin drepur, og eingin skal doyggja, so má ferðin sjálvandi niður.

**Vandin at doyggja økist 21% koyrir tú 90 km/t**




## Karaktermorðið hjá Edmundi

Av og á er pennurin hjá Edmundi Joensen óvanliga hvassur. Serliga hvassur var hann í vikuni, tá hann svaraði aftur upp á eitt innslag í Degi og Viku týskvøldið. Men tað sermerkta við hesum aftursvarinum var, at Edmund Joensen fór beinleiðis eftir manninum og ikki eftir málinum.

Hann skírdi Páll Holm Johannesen, sjónvarpsmann, at verða »ein politiskan svein hjá Javnaðarflokkinum« og spurdi, um tað er so *livandi galið, at hann borðreiðir við eini saftigari konflikt millum Edmund Joensen og Kaj Leo Johannesen í bestu senditíð.*

Nær er ein journalistur ein »politiskur sveinur« hjá einum flokki? Hvat meinar løgtingsmaðurin, fyrrverandi løgmaðurin, fólkatingsmaðurin og fyrrverandi løgtingsformaðurin við? Tað lystir okkum at vita. Er Páll Holm Johannesen limur í Javnaðarflokkinum? Kennir hann onkran javnaðarmann, ella hvat?

Heilt erligt Edmund. Hatta var undir beltið. Og hvat so, um ein miðil setir ljóskastaran á allar tær konfliktir, sum Edmund Joensen so ofta vartar upp við?

Nú skrivar Høgni í Jákupsstovu, redaktiónsleiðari, í aftursvari, at Edmund Joensen »hevur styrkt seg við einum albrynjaðum spunasmiði«. Tað er áhugavert at vita, hvør hesin spunasmiður við hesum óvanliga hvassa penni er. Tað plagdi at vera ein ávísur journalistur, men hann er vist farin aðrar leiðir.

Tað er einki forgjørt í, at ein politikari styrkir seg við spunasmiði ella spindoktara. Tað er í fínasta ordan. Men hví ikki spæla við opnum kortum og kunngera, hvør spunasmiðurin er? Tað ger man í øðrum londum.

Í øllum førum var hatta svarið hjá Edmundi illa spunnið.



**Tí var Dánjal ikki við Hvonn Live**

JONHARD HAMMER
KJAK Á SÍÐU 26



**Ljótt og ósakligt Edmund**

HØGNI Í JÁUPSSTOVU
KJAK Á SÍÐU 27

## Sex og menningartarn

Í morgin klokkan 19 skipa Javni og psykiatriski depilin fyri fyrilestri í Miðlahúsinum í Vágsbotni við Anette Løwert, sálarlækna, um seksualitet og menningartarn.

Anette hevur drúgvar royndir innan arbeiðið við fólki við menningartarni. Eftir at hon í 1979 fekk læknaprógv hevur hon fyri tað mesta arbeitt við fólki við serligum tørvi. Hon byrjaði í 1984 á táverandi Åndsvageforsorgen í Brejning har hon arbeiddi í eitt ár. Sama ár fekk hon útbúgving og autorisatión sum spesialistur í kliniskari sexologi, sum hon gjøgnum árini hevur brúkt nógv til fólk innan hetta økið.

Í 1990 vann Anette sær útbúgvin sum serlækni í psykiatri. Núverandi starvssetan hennara sum yvirlækni á Vejle Sygehus er frá 1992 og hevur hon síðani tá arbeitt burturav við fólki við menningartarni við sálarligum trupulleikum. Anette Løwert hevur, umframt ein hóp av bóklingum og upplýsandi tilfari, skrivað tríggjar bøkur, sum eru sera viðkomandi fyri hendan málbólkin. Nýggjasta bók hennara er "Hans Peter har også en sindslidelse".

Seinastu 4 árini hevur Anette Løwert verið knýtt at Psykiatriska depilinum á Landssjúkrahúsinum sum konsulentur serliga við atliti til fólk við menningartarni. Hon hevur hesa tíðina hildið fleiri skeið og fyrilestrar innan psykiatriska økið fyri starvsfólki og avvarðandi herheima.

Nú Anette aftur er í Føroyum í arbeiðsørindum fyriskipa Javni og Psykiatriski depilin fyri einum almennum fyrilestri um seksualtitet og menningartarn. Tað er vælkent, at seksualitetur og menningartarn kann vera ein trupul samanseting. Bæði avvarðandi, námsfrøðingar og stuðlar hjá ungum og vaksnum fólki við menningartarni uppliva ofta tvístøður ella frustratiónir, sum hava grundarlag í seksualitetinum hjá persóninum. Øll hava tørv á kærleika og nærkontakt. Hetta er ein partur av seksualitetinum og kemur til sjóndar uppá ymiskan hátt alt eftir menningarstøði og lívsstøðu yvurhøvur. Menøniskju við menningartarni hava sjálvsagdan rætt til ein seksualitet og til at fáa vegleiðing og hjálp til at útinna hann. Men vegleiðingaruppgávan tykist tó lættari søgd enn gjørd. Vit síggja tí fram til at fáa meira vitan innan hetta viðkvæma evni.

Fyrilesturin er almennur og ókeypis.

**Sosialurin**
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*